# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Tað er stórur munur á at spæla í Premier League og í næstbestu deildini, men eg haldi, at tað er truplari at spæla í næstbestu deildini*

*Seol Ki-Heyon, koreanskur spælari í Reading*

# Hondbólturin byrjar við braki



*Hondbóltskappingin byrjar leygardagin, og um vikuskiftið spæla bæði menn og kvinnur*

**Fyrstu dystirnir í hondbóltskappingunum hjá monnum og kvinnum verða spældir um vikuskiftið. Longu leygarkvøldið bresta VÍF og Kyndil saman í Vestmanna**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Leygardagin kl. 18.00 verður fyrsti hondbóltsdysturin í nýggju landskappingini hjá monnum spældur. Dysturin verður í Vestmanna, og tað verða arvafíggindarnir VÍF og Kyndil, sum fara at bresta saman.

Hesi liðini hava seinnu árini verið harðir kappingarneytar í toppinum, og leygardagin fæst fyrsta ábendingin um, hvussu liðini eru fyri í ár.

Sunnudagin verða tveir dystir í Atlantic Airways kappingini, sum landskappingin hjá monnum verður rópt. Tá fara Neistin og StÍF at spæla í høllini á Hálsi í Havn, og í Hoyvíkshøllini spæla H71 og KÍF.

Hondbóltssambandið hevur sent fyrstu trý umførini í landskappingini út, og í øðrum umfarinum 14. og 15. oktober verða dystirnir hesir: KÍF-Neistin, StÍF-VÍF og Kyndil H71. Í triðja umfari 29. oktober verður spælt soleiðis: H71-StÍF, KÍF-Kyndil og VÍF-Neistin.

### Kvinnurnar byrja eisini

Sunnudagin verður fyrsti dysturin í kvinnudeildini, og hann verður spældur í Havn. Neistin tekur ímóti StÍF.

Søljan hevur tikið sítt lið úr fremstu kvinnudeildini, og tí eru bert fimm lið eftir í kappingini – Stjørnan, Neistin, VB, StÍF og Kyndil.

Tann 14. oktober spæla meistararnir úr Stjørnuni fyrsta dystin, og hann verður á útivølli ímóti StÍF. Dagin eftir spæla Kyndil og VB í Havn. Tann 29. oktober verða tveir dystir á skránni. Tey bæði fremstu liðini í fjør, Stjørnan og Neistin, spæla í Klaksvík, og í Vági spæla VB og StÍF.




## Formulaliðið

Ítróttar-Sosialurin mannar vikuliðið við spælarum, sum stóðu seg væl í 25. umfari av Formuladeildini sunnudagin

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

## Føroyar vunnu stórsigur

Tað er ikki ofta, at føroysk fótbóltslið vinna stórsigur í altjóða fótbólti, men tað eydnaðist hjá U19 kvinnulandsliðnum sunnudagin.

U19 kvinnurnar vóru í farnu viku við í EM-undankapping í Svøríki, og mótstøðan var sera hørð. Føroyar endaðu í bólki saman við Svøríki og Fraklandi, sum verða roknað millum sterkastu liðini í Europa, og tað endaði eisini við tveimum 7-0 tapum til Føroyum.

Sunnudagin spældu Føroyar ímóti Kazakhstan, og nú var sum vent í holuni. Hesaferð var tað føroyska liðið, sum var greitt við yvirlutan.

Føroysku genturar løgdu hart út og høvdu frá byrjan fleiri málmøguleikar. Men hóast greiða yvirvág og fleiri málmøguleikar, so kom ikki hol á fyrr enn, tá 29 min vóru leiktir. Longu tveir minuttir seinni bleiv tað til 2-0. Málini komu eftir somu uppskrift. Heidi Sevdal sendi Hannu Isaksen avstað, og hon rann báðar ferðir frá verjuni og skoraði.

Í seinna hálvleiki høvdu føroysku genturnar somuleiðis greiða yvirvág. Tá 58 minuttir vóru leiktir, fingu Føroyar 3. málið, og næstu 15 minuttirnar skoraðu Føroyar trý mál afturat. Fyrst var tað Olga Kristina Hansen, sum setti eitt innlegg úr vinstru frá Heidi Sevdal í mál. 4-0 var eftir horna, sum Hellen Haraldsen sendi innfyri, og Jacoba Langgaard skallaði í málið. 5-0 kom uppá brotsspark, sum bleiv dømt, eftir at stinni verjuleikarin Bjørg Syderbø var komin fram við og var sparka niður í fríari skotstøðu. Liðskiparin, Jacoba Langgaard, sendi brotssparkið trygt í málið. Heidi Sevdal slerdi sigurin fastan við málið til 6-0.

Fult uppiborin sigur, har føroyska liðið slapp at spæla álopsfótbólt og brúka kreftir longur frammi á vøllinum enn í dystunum ímóti Fraklandi og Svøríki.